*Dagf. 27. oktober 2025*
*HMR j. nr. 25/27713-6*

**Súsanna Bertholdsen**
**landsstýriskvinna**

***Svar***

***upp á***

**Fyrispurning nr. 52-032/2025 eftir § 52a í tingskipanini um kostnaðin fyri projektering, ráðgeving, og eftirlit við H-bygninginum síðan byrjanina av verkætlanini, frá Johani Dahl, løgtingsmanni**

**Spurningarnir vóru soljóðandi:**

1. Hvat hevur projekteringin kostað tilsamans og býtt yvir ár?
2. Hvat hava ráðgevandi verkfrøðingar kostað, sum eru keyptir inn til verkætlanina?
3. Hvat hevur kostnaðurin fyri eftirlitið við byggingini verið í allari byggitíðini?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Sambært Landsverki hevur projekteringskostnaðurin fyri verkætlanina í sambandi við H-bygningin (t.e. undantikið kjallaraverkætlanina og samanbyggingina millum H- og B-bygningin), kostað tilsamans knappar 72,8 mió. kr., og eru tølini í mió. kr. býtt á ár í talvuni niðanfyri.

Fyrireikingar- og prosjekteringskostnaður frá 2009 - 2024 í mió. kr.

| 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2,70 | 0,98 | 0,59 | 3,36 | 2,63 | 4,40 | 14,76 | 8,12 | 7,67 | 4,84 | 3,46 | 5,92 | 10,66 | 2,16 | 0,38 | 0,16 |

Viðmerkjast skal, at tey fyrstu árini snúðu seg um fyrireikandi arbeiði. Farið varð undir at projektera H-bygningin í 2014. Fyrireikingararbeiðið og projekteringin eru skrásett á sama verkevni, og fevna tær 72,8 mió. kr. tí um bæði fyrireikingararbeiðið og projektering.

**Til spurning 2**
Hesin spurningur verður fataður sum um, at spurt verður um, hvussu stórur partur av projekteringkostnaðinum er nýttur til at keypa ráðgeving.

Viðvíkjandi H-bygninginum hevur talan serliga verið um høvuðsráðgeving frá einum samtaki av fýra fyritøkum. Høvuðsráðgevingin, sum er keypt frá samtakinum síðani 2014, hevur kostað 41 mió. kr. Harumframt hevur logistikkráðgeving kostað 2 mió. kr., innbúgvsráðgeving 4,6 mió. kr., køksráðgeving 1,2 mió. kr. og projekteringsleiðsla 1 mió. kr. Afturat hesum kemur ein kostnaður til ráðgevandi verkfrøðing, í sambandi við kanningar av lekum og ábótum í H-bygninginum.

**Til spurning 3**

Spurt verður um, hvat kostnaðurin hevur verið fyri eftirlitið, og hevur Landsverk sagt frá, at útreiðslurnar til eftirlit í allari byggitíðini hava verið 8,8 mió. kr. Hendan upphædd til eftirlit, sum høvuðsráðgevingin hevur staðið fyri, er skrásett á annað verkevni, og tí ikki partur av upphæddini í svarinum til fyrsta spurningin. Sambært Landsverki er talan um eftirlit viðvíkjandi H-bygninginum sjálvum (t.e. undantikið kjallaraverkætlanina og samanbyggingina millum H- og B-bygningin).

Heilsumálaráðið, 27. oktober 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna